

Effodeildin støðan

NR.	LIÐ	DYSTIR	VUNNI	JAVNT	TAPT	+ MÁL	- MÁL	+/-	STIG
1	NSÍ	1	1	0	0	6	1	+5	3
2	Víkingur	1	0	1	0	2	2	0	1
3	ÍF	1	0	1	0	2	2	0	1
4	HB	1	0	1	0	2	2	0	1
5	AB	1	0	1	0	2	2	0	1
6	TB	1	0	1	0	1	1	0	1
7	KÍ	1	0	1	0	1	1	0	1
8	EB/Streymur	1	0	1	0	1	1	0	1
9	B36	1	0	1	0	1	1	0	1
10	FC Suðuroy	1	0	0	1	1	6	-5	0

fyrsta umfari vóru partur av 2-2 javnleikum. Hóast fuglfirðingar vóru frammanfyri 2-0 í Gøtu, so vóru teir ikki misnøgdir við úrslitið. HB var tvær ferðir frammanfyri á heimavølli ímóti AB, og í HB fjaldu teir ikki vónbrotið.

-Vit ætla okkum at vinna hvørja ferð og serliga í Gundadali. Vit kunnu gleðast um, at nú er hol sett á kappingina, men annars kunnu vit ikki gleða okkum um avrikið ímóti AB, sigur miðvallarin Levi Hanssen. Hann heldur ikki, at teir kunnu brúka tað til so nógv, at Fróði Benjaminsen ikki var við, og at Christian R. Mouritsen tíðliga í 2. hálvleiki noyddist av vøllinum.

-Vit vóru ikki nóg raskir at pressa fram ímóti dystarenda, og vit myndaðu ikki nóg nógvar málmøguleikar. Tað skulu vit verða betri til.

Nýggi ÍF venjarin Aleksandar Jovevic fegnast um vitjanina í Sarpugerði, og hann gleðir seg til sunnudagin:

At spæla ímóti HB er altíð stórt. Hugburðurin hjá okkara monnum var sera góður í Gøtu, og eg ivist ikki í, at spælararnir verða uppsettir ímóti HB. Tað er stórur saknur, at Adeshina Lawal er leikbannaður, og at Nenad Saric er skaddur. Kappingin um plássini er stór, og teir, sum nú fáa møguleikan, eru uppsettir at vísa, at tað er dugur í teimum.

Spiltu seg burtur

B36-VÍKINGUR: PÁLL AUGUSTINUSSEN SUNNUDAGIN KL. 16.45

Meistararnir í B36 fáa seint seinnapartin sunnudagin vitjan av steypavinnarunum í Víkingi. Bæði liðini fingu í fyrsta umfari eitt stig á heimavølli. Felags fyri bæði liðini er, at tey kendu seg at tapa tvey stig heldur enn at vinna eitt stig:

-Vit gleða okkum til at spæla ímóti Víkingi á okkara heimavølli. At vit týskvøldið spældu á Tórsvølli vísti seg at vera eitt mistak. Har vóru ikki umstøður til eitt tvey samanspæl, og tað bar illa til at spæla stikkbóltar. Eftir steðgin vístu vit góðan hugburð, tá ið vit vóru tíggju ímóti ellivu og kortini pressaðu. Henda hugburðin skulu vit hava við okkum ímóti Víkingi, sigur Jákup á Borg, hjálparvenjari og liðformaður í B36.

Víkinga venjarin Sigfríður Clementsen iðrar seg um, at hansara menn ikki vunnu fulla úrtøku ímóti ÍF. Undan ferðini suður í Gundadal velur hann tó at síggja tað frá positivu síðuni:

-At vit megnaðu at svara aftur og javna, hóast vit vóru aftanfyri 2-0, sigur mær, at hugburðurin er góður. Vit hava vant sera nógv í vetur, og fram ímóti dystarenda sást, at vit eru væl fyri likamliga. Vit høvdu møguleika at skora sigursmálið, men marginalirnir vóru ikki við. Nú er avbjóðingin meistararnir á útivølli, og tað er spennandi uppgáva.

Í fjør var talan um minnisríka uppgerð, tá ið Víkingur í triðja umfari vitjaði B36, og úrslitið varð 2-2. Tá umsetti Jákup á Borg brotsspark til mál fyri B36 í evstu løtu. Hetta stigið var kærkomið, tá ið tað í heyst varð talt upp, og B36 vann FM við einum stigi frammanfyri næsta avbjóðaran!

Hugburðurin er framúr góður

AB-TB: ALEX TROLEIS SUNNUDAGIN KL. 14.00

Oddbjørn Joensen og hansara menn fóru sunnudagin úr Gundadali við 2-2 og einum stigi ímóti favorittunum í HB. Tað fegnaðust teir uttanfyri ánna um, tí HB varð roknað at vera stórur favorittur.

Nú eigur AB heimavøll ímóti uppflytarunum í TB. Hóast tvøramenn síðstu løtuna vóru níggju ímóti ellivu KÍ spælarum, so iðra teir seg um, at tað ikki eydnaðist at vinna meiri enn eitt stig í 1-1 javnleikinum:

-Vit eru undirtippaðir hvørja ferð, men vit hava eina góða kenslu. Páll Guðlaugsson megnar at fáa okkum av álvara at stríðast fyri søkini, og tað fer vónandi at bera langt. Aðalmálið hjá okkum er at sleppa undan niðurflyting, og tað rokna vit avgjørt við fer at eydnast, sigur Teitur Justinussen hjá TB.

Jógvan Skeel Nolsøe var annar av AB málskjúttunum í Gundadali:

-Sjálvsálitið hevur stóran týdning. Ímóti HB sóu vit í 1. hálvleiki, at vit megnaðu væl at spæla upp ímóti teimum, og tað sást aftur á avrikinum í 2. hálvleiki, tá ið vit stríddust sera nógv. Hetta skulu vit byggja víðari á, nú tá ið TB kemur at vitja okkum, sigur Jógvan Skeel Nolsøe.

Í AB vóna teir, at tað tíðliga í kappingini fer at laga seg so mikið væl, at tað fer at síggjast, at AB ikki longur skal stríðast fyri at sleppa undan vandanum at flyta niður.

Nú sleppa útlendingarnir upp í part

KÍ-FC SUÐUROY: EILER RASMUSSEN SUNNUDAGIN KL. 15.00

Tað er synd at siga, at kappingarskráin er blíð við uppflytararnar í FC Suðuroy. Í fyrsta umfari vóru teir í Runavík, har teir uttan útlendsku spælararnar løgdu rygg til 6-1 tap, og í 2. umfari skulu teir norður til Klaksvíkar.

-Vit vóru øgiliga skerdir ímóti NSÍ, tí allir tríggir útlendsku spælararnir, sum hava verið við í fyrireikingunum, sótu uttanfyri, tí loyvini ikki vóru komin upp á pláss. Tað bar rokeringar og broytingar við sær, og tá vit so fingu tvey mál ímóti okkum beinanvegin og trý mál ímóti okkum í løtuni kring steðgin, so var ikki so nógv at gera. Hetta var undirstriking av, hvussu stórur munur er á bestu og næstbestu deildini. Nú hava vit lagt hatta afturum okkum. Vit royna at vera positivir, og vit gleða okkum at fara til Klaksvíkar, har tað bæði er torført og hugaligt at spæla, tí har møta nógvir áskoðarar. Tað verður neyvan á útivølli, at vit fara at vinna sigrarnar, og vit verða nøgdir, um vit hava eitt stig suður aftur við okkum, sigur Jón Krosslá Poulsen, ein av fáu spælarunum hjá FC Suðuroy, ið hevur royndir í bestu deildini.

Í Klaksvík iðra teir seg um, at tað ikki eydnaðist at vinna í Trongisvági, har KÍ var frammanfyri, inntil tað varð javnt við sjáldsomum sjálvmáli.

-Vit vóru omaná í 1. hálvleiki, men so mistu vit takið. At vit ikki megnaðu at vinna, tá ið vit vóru ellivu ímóti níggju var vónbrot, sigur KÍ málverjin Meinhardt Joensen.

Petur Andreasen var fremsti maður í 1. hálvleiki ímóti TB. Páll A. Klettskarð, sum hevur verið skaðadarvaður, spældi í 2. hálvleiki. Sunnudagin verður hann aftur í fremstu røð, har hann verður undir liðini á Kenan Hajdarević, sum er tøkur, eftir at loyvini eru komin upp á pláss.

Einki er at ivast í, at KÍ frá fyrsta bríksli fer at seta gestirnar undir stórt trýst.

KÍ

Ikki við: Evrard Blé (fóturin)
Nýggjur: Kenan Hajdarević (loyvini eru komin upp á pláss)

ÍF

Ikki við:
Adeshina Lawal (leikbann, longd ikki staðfest enn), Nenad Saric (ryggurin, 2 vikur), Jan Ellingsgaard (burturstaddur)
Ivasamur:
Clayton Soares (Spælaraloyvi)

AB

Ikki við: Kristin R. Mouritsen (burturstaddur, 1,5 mánað), Hørður M. Mohr (burturstaddur, 2 mánaðir)
Við aftur: Beinir Ellefsen

TB

Ikki við: Albert Adu (leikbann), Martin Tausen (leikbann)
Nýggjur: Franck O. Able (klárur, fingið arbeiðsloyvi)

FC SUÐUROY

Ivasamir: Jón Áki Jacobsen (knæið), Ari K. Poulsen (fóturin), Mamuka Toronjadze (loyvið), Valerian Lobashvili (loyvið)
Við aftur: John T. Poulsen (burturstaddur)
Nýggjur: Christian Ibeagha (Loyvini komin upp á pláss)